Álit

í

løgtingsmáli nr. 137/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjófeingi (Sjófeingislógin) (Loyvi at landa og avreiða í mesta lagi 15% uttanlands)

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard, hevur lagt málið fram tann 13. apríl 2021, og eftir 1. viðgerð tann 15. apríl 2021 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 19. og 22. apríl 2021.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Vaðhorn, Delta Seafood, P/f Norðborg, Pelagos, Føroya Arbeiðarafelag og landsstýrismannin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í tríggjar minnilutar.

Ein minniluti (Bjørt Samuelsen, Henrik Old og Bjarni K. Petersen) hevur hesar viðmerkingar:

Sjófeingislógin hjá samgonguni er longu broytt óteljandi ferðir, síðani lógin kom í gildi við ársenda í 2019. Nú verður enn ein av høvuðsásetingunum í lógini broytt, við tað at kravið um, at allur veiddur fiskur sum útgangsstøði skal landast í Føroyum fyri at vera atkomuligur til virkingar og virðisskapan í Føroyum verður linkað. Landsstýrismaðurin hevur longu heimild at geva undantak í serstøkum føri.

Tað er sera trupult at hóma, hvør fiskivinnupolitikkurin hjá samgonguni er. Lóggávan er við mongu broytingunum, sum longu eru gjørdar, og fleiri, sum eru til viðgerðar í løtuni, ein sannur fløkjustampur. Fet fyri fet tykist samgongan bakka frá sínum egnu avgerðum.

Høvuðsgrundgevingin fyri, at tað nú skal verða loyvt at landa og avreiða 15% av veiðuni av øllum fiskasløgum uttanlands er, at eitt veiðigjald er ávegis, og "tað hevði verið ein trygd fyri prísásetingina í Føroyum, um ein partur av veiðini kann avreiðast uttanlands."
Men veiðigjaldið er einans fyri uppsjóvarfisk og botnfisk í Barentshavinum, og tykist hetta tí sum ein marghættlig grundgeving fyri at lata upp fyri landing uttanlands av botnfiski veiddur undir Føroyum.

Politiska skipanin má gera upp við seg sjálva, hvat vit vilja við fiskivinnuni á landi. Hesin minnilutin heldur tað hava týdning at tryggja, at virðisøkingin av veiddum fiski í størstan mun fer fram í Føroyum, og at arbeiðsplássini verða skapt her, heldur enn í láglønarlondum.

Minnilutin ásannar, at serligar avbjóðingar eru við svartkjaftinum. Størstu mongdirnar verða veiddar hesa ársins tíð, har svartkjafturin er bleytur, heldur sær stutt og góðskan illa er egnað til matna. Avmarkað er av móttøkukapasiteti til ídnað, og kappingin sera avmarkað.
Minnilutin skjýtur tí upp, at 30% av svartkjafti kann landast uttanlands, men avmarkað til apríl og mai á hvørjum ári.

Minnilutin setir tískil fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

Í § 1, nr. 1 verður § 41, stk. 1 orðað soleiðis:
"Veiða á fiskiførum undir føroyskum flaggi skal landast og avreiðast um bryggjukant í Føroyum, tó kunnu í mesta lagi 30% av veiðuni av svartkjafti, í apríl og mai mánað á hvørjum ári, landast og avreiðast uttanlands."

Viðmerkingar:
30% av svartkjafti kunnnu landast uttanlands í apríl og mai á hvørjum ári. Allur annar fiskur skal sum útgangsstøði landast í Føroyum.

Við hesi broyting og viðmerkingum tekur hesin minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Ein annar minniluti (Jákup Mikkelsen, Johan Dahl og Beinir Johannesen) tekur undir við málinum soleiðis, sum tað fyriliggur.

Hesin minnilutin tekur undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Ein triði minniluti (Bjarni Hammer) hesar viðmerkingar:

Hetta er ein háðan av fiskivinnuni, fiskavirkjum og øllum, sum arbeiða á fiskavirkjum á landi í Føroyum.
Hetta er enn ein staðfesting av, at landsstýrið ikki metir føroyingar vera góðar nokk. Aftur ein lovprísan av, at útlendingar eru betri enn føroyingar at taka ímóti og at virðisøkja fiskin, sum føroyingar fiska.
Tað líkist ongum og er ein beinleiðis katastrofa fyri fiskavirkini og tað arbeiðandi fólkið á landið í Føroyum. Hetta er steinur oman á byrðu hjá eini vinnu, sum frammanundan siglir í tungum sjógvi. Hvar er virðingin og álitið á hesa aldargomlu fiskivinnu – síðani 1840-ini. Tað er talan um á leið 1000 arbeiðspláss í Føroyum, sum tey flestu liggja í útjaðaranum.

Bæði fakfeløg og virkir siga klárt og týðiligt, at hetta fer at verða eitt stórt bakkast fyri alt tað, sum er bygt upp í Føroyum seinastu mongu árini. Hetta er eitt afturstig av teimum heilt stóru, sum kann blíva mønustingurin hjá vinnuni á landi, sum virkar botnfisk og byrjanin til endan hjá uppsjóvarvirkjunum.

Tað er ríkiligt av framleiðsluorku í Føroyum, og sum er mangla virkini rávøru. Tí er tað undranarvert, at landsstýrið leggur beinleiðis upp til, at 15% av tilfeinginum hjá øllum føroyingum verður tikið frá føroysku fiskavirkjunum, sum standa eftir við turrum gólvum. Tað er óskiljandi, at landsstýrið beinleiðis virkar fyri at gera livikorini hjá føroyingum verri.
Avleiðingin verður, at 15% av arbeiðsmegini innan fiskivirking á landi verður burtur. Hetta er galdandi bæði fyri virkini, sum virka botnfisk og uppsjóvarvirkini.

Hesin minnilutin mælir staðiliga frá at samtykkja hetta uppskotið.

Hesin minnilutin tekur tískil ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Vinnunevndin, 23. apríl 2021

Bjørt Samuelsen formaður	Johan Dahl næstformaður	Bjarni Hammer
Henrik Old	Bjarni Kárason Petersen	Beinir Johannesen
	Jákup Mikkelsen	